

*Alt starvsfólkið í miðfyrisitingini var til evnisdag leygardagin, har tosað varð um, hvussu samstarvið ímillum tey sjey stjórnarráðini kann betrast.*

# Miðfyrisitingin gerast smidligari

**Leygardagin var temadagur fyri miðfyrisitingina ella tey sjey stjórnarráðini, sum tey eisini verða nevnd. Ætlanin er nevniliga at fremja nakrar broytingar har, soleiðis, at tey sjey ráðini, sum hig-artil hava virka at kalla hvør sær, framyvir skulu hava eitt felags virðisgrundarlag**

MIÐFYRISITINGIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Leygardagin var øll miðfyrisitingin á einum evnisdegi í Norðurlandahúsinum, har kjakast varð um, hvussu samstarvið kann bøtast, m.a. til frama fyri almenningin. Nógv kom burturúr degnum, og høvuðsdenturin varð lagdur á fýra meginreglur, sum øll ráðini framyvir skulu arbeiða eftir.

## 4 felags mál

Í tí sambandi vóru nakrar meginreglur settar upp.

Tann fyrsta æt, »Felags ábyrgd«. Í tí sambandi var kjakast um, hvussu miðfyrisitingin framyvir kann finna felags loysnir og kenna, at tey arbeiða saman.

Næsta meginreglan æt »Vit raðfesta rætt«. Har var m.a. viðgjørt, hvussu miðfyristingin kann arbeiða skjótt og væl, uttan drál og hvussu felags virðir kunnu verða skapað.

Triðja meginreglan sum arbeitt varð við hevði heitið »Vit vilja vita«. Har varð fokus sett á, hvussu tey kunnu læra alt lívið og hvussu man heldur forvitninum eftir at læra við líka.

Fjórða meginreglan æt »Vit bróta slóð«. Tá varð dentur lagdur á hvussu miðfyrisitingin kann gerast meiri nýskapandi og hvussu hon kann fremja betri loysnir.

Fyri hvørt av punktunum fekk starvsfólkið í ymsku ráðunum høvi at siga sína hugsan, og at kjakast um, hvønn týdning meginreglurnar fara at fáa í gerandisdegnum.

Eisini vóru fólk býtt upp í bólkar, har tey meiri konkret fingu møguleikan at práta og kjakast um evnini.

## Væl móttikið

Jeanette Blaasvær, sum er fulltrúði á løgmansskrivstovuni, sigur, at evnisdagurin var sera væl eydnaður.

– Stjórnarráðini vóru jú stovnað í 1997, men hetta er fyrsta stevnan, sum hevur savnað øll starvsfólkini, og tað vóru tey sera glað um. Tey hava jú dagligt samskifti, fleiri av teimum, men tey hava allíkavæl ikki heilsa uppá hvønn annan andlit til andlitis, greiðir Jeanette frá.

Hon sigur, at flestu luttakararnir hildu, at hetta var nakað, sum átti at verið eitt afturvendandi tiltak.

– Tað stendur í samgonguskjalinum, at tey sjey stjórnarráðini skulu fáa betri samstarv í lag, og við hesum evnisdegnum varð hol sett á samstarvið, sigur Jeanette.

Í næstum verður arbeitt víðari við tí, sum kom fram á degnum.

– Nú skulu hesi hugskotini fyrst arbeiðast ordiliga ígjøgnum, m.a. við at hava slíkar evnisdagar úti í ráðunum. Ætlanin er, at ein ítøkilig ætlan skal liggja klár, áðrenn vit fara í summarfrí, so hetta verður tikið í størsta álvara, ger Jeanette Blaasvær greitt.

Hon sigur, at almenningurin væntandi fer at hoyra meiri um ætlaðu broytingarnar, so skjótt tær eru vorðnar meiri ítøkiligar. M.a. eru ætlanir um at umskipa móttøkurnar í teimum sjey stjórnarráðunum, soleiðis, at tær fara at vera felags.

– Hugskotið er at skipa tað soleiðis, sum Tórshavnar Kommuna hevur gjørt við Snarskivuni. Eitt høvuðstelefonnummar skal eisini vera fyri øll ráðini, har ein skrivstovudama so beinir teg víðari til tann, tú skalt tosa við. Tað skal sostatt verða rættiliga nógv lættari og smidligari fyri almenningin at nýta miðfyrisitingina, sigur Jeanette Blaasvær at enda.



*Øll vóru tey sera væl nøgd við dagin. Serliga tí, at fleiri teirra hava dagligt samskiftið umvegis telefon ella teldu, men tey hava ongantíð verið saman sosialt, og tey hava heldur aldri samarbeitt á henda hátt.*



*Til seinasta partin av degnum, har ymsu evnini, sum fólk høvdu arbeitt við ígjøgnum dagin, vórðu løgd fram, vóru eisini landsstýrismenninir til staðar. Til tíðir var tað rættiliga skemtiligt*

## Hugnadagur fyri tey eldru

**Klaksvík:** Komandi leygardag skipa felagið "Hugni" og Landsfelag Pensjónistanna fyri eldradegi í Ósáskúlanum í Klaksvík. Dagurin byrjar kl. 9 við at Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í vertsbýnum setur eldradagin, og verður síðani hildið á til kl. 18.

Millum tey mongu áhugaverdu evnini á degnum kann nevnast vitjanin av Jógvani við Keldu, innlendismálaráðharra, sum fer at tosa um eldrapolitikk, eins og Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri fer at tosa um fiskimannakonurnar og familjuna.

Á skránni er eisini ein fyrilestur eftir Elisabeth Akursmørk, sum fer at greiða frá um heilsugóðan mat. Umframt hetta verður nógvur sangur, eins og luttakararnir fáa høvi at bera fram heilsanir.

Millum øll tey mongu tiltøkini verður sjálvandi eisini høvið hjá teimum eldru úr og av býi at tosa saman afturvið einum góðum drekkamunni.

**sb.**



*Klaksvíkingar verða vertir fyri eldradegnum komandi leygardag*

## Stór kapping fyri skatarar

**Havn:** Tey sum dáma væl skating eiga at seta vikuskiftið 20. og 21. mai av í kalendaranum.

Tá verður nevniliga skipað fyri eini stórari skaterkapping í Ítróttarhøllini á Hálsi, har teir vænta ein hóp av ungum og ídnum skatarum.

Hetta tiltakið, ið kallast "AlienXplotion" er uttan iva størsta skaterkapping nakrantíð í Føroyum. Her fáa teir allir ein ótrúligan møguleika at vísa, hvat teir duga, tá talan er um streetskating og rampuskating.

Tað verður tó ikki bert skating á skránni hesar báðar dagarnar. Har verður eisini ein konsert við Direct Level, og har verður dansur, multimediashow, prædikur, plátuvendari og mangt annað.

**sb.**

## Barnaansing fyri 2000 børnum

**Havn:** Eitt mál, sum ofta hevur verið umrøtt í høvuðsstaðnum var tørvurin á ansingarplássum.

Men undir farnu samgonguni eydnaðist tað at koma til botns í hesum trupulleikanum, soleiðis at bíðilistin kom niður á 0.

Eitt yvirlit frá Tórshavnar kommunu vísir, at íalt eru seks sløg av tilboðum til barnaansingina, umframt ta kommunalu dagrøktina. Í hesi barnaansingini eru íalt 2.028 børn.

Í Havn eru í dag 18 vøggustovur, 22 barnagarðar, tveir útibarnagarðar, átta býlingshús, tvey frítíðarheim og sjey frítíðarskúlar, samstundis sum 120 børn eru knýtt at kommunalu dagrøktini.

**sb.**

## Line-dansur í Eydnuni

Nú Line-dansur er alt meir og meir at síggja við ymisk dansihøvi, skipar Eydnan á Oyrarbakka fyri skeiði í Line-dansi, fyri tey, íð hava hug at læra meira av hesum stuttliga dansi.

Skeiðið verður hildið fríggjadagin 22. (dýra biðidag) og leygardagin 23. apríl.

Lagt verður soleiðis til rættis, at bæði tey, íð ikki hava lært dansifet áður, og tey, íð hava lært at dansa frammanundan, fáa væl burutúr.

Og tey, sum eru víðari befarin fáa eisini væl burturúr, tí talan er um ein av fremstu undirvísarum í Line-dansi úr Danmark, Gitte Petersen.

Byrjað verður fríggjadagin seinnapart, og hildið verður fram til nakað út á kvøldið. Byrjað verður aftur leygardagin og hildið verður fram til seint seinnapartin.

**Driv spælir til dans**

Sum endabrestur á tiltakinum, spælir dansiorkestrið »Driv« til dans leygarkvøldið. »Driv« er kent um landið fyri at spæla framúr góðan dansitónleik, og hetta kvøldið verður eisini serligur dámur settur á við Line-dansitónum.

Skráin fyri tiltakið verður lýst nærri í komandi viku.

**eys**